# Jólablaðið

**Jólaredaktiónin:**


Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo


Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo


Jens Kristian Vang
jensk@sosialurin.fo


Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo


Inna Törnroos
inna@sosialurin.fo

# Ársins jólahandil

Lagt til rættis: Ása Østerø og Anna Poulsen, praktikantar

## Hvat er besta jólagávan tú hevur fingið?



***Bergur Rasmussen (40), havnarmaður - býr í Vestmanna***
**Help plátan hjá The Beatles, sum eg fekk í 1980. Tað var nokk ein tann týdningarmesta gávan**



***Sólvá Svartafoss (20), Tórshavn***
**Ein sekkjastól**



***Bárður Persson (40), Havn***
*Tað er ringt at siga hvat er tann besta gávan, men minnist meg rætt var eg ógvuliga glaður fyri ein fjarstýrdan bil, sum eg fekk tá eg var 9-10 ára gamal, frá mammu og babba.*



***Eirikur Jensen (17), Sandi***
**Klæðir**



***Katrin Hanusson Dahl (15), Tórshavn***
**Tað var ein stýrisleða, sum eg fekk tá eg var 6-7 ára gomul**



***Kári Fossaberg Ellingsgaard (14), Hoyvík***
**Eitt snowboard**

## Øll fingu jólagávu í Sumba

Bygdaráðið í Sumbiar kommunu hevur avgjørt at øll húski skuldu fáa jólapakka í ár.

Fyrr í vikuni koyrdu tí allir bygdaráðslimir út til hvørt húski í kommununi við jólapakkunum.

Í pakkanum var ein dunna, ein eskja við karamellum og álmanakkin hjá Lions Suðuroy fyri komandi ár, tann sonevndi Suðuroyarkalendarin.

Sumbiar kommuna fevnir um bygdirnar Sumba, Víkarbyrgi,



Lopra, Leiti og Akrar.

Hetta er ikki einasta kommuna í landinum sum veitir borgarum sínum hesa tænastu. Eisini borgararnir í Skálavíkar kommunu hava fingið eina líknandi heilsan frá bygdaráðnum uppundir hesi jólini.

